Fýra lið á odda

Rættiligur spenningur er í 1. deild hjá monnum. Fýra lið - TB, VB/Sumba, B68 og FC Hoyvík hava 9 stig hvør í oddinum. B71 er komið fyri seg, aftaná tvey tap tey fyrstu tvey umførini. Hesa ferð vann FC Hoyvík 3-1 á tB, sum annars var einsamalt oddalið. VB/Sumba vann 3-2 á Skála, sum enn einki stig hevur fingið. B71 hevur fingið glið, og um vikuskiftið vunnu teir 1-0 á Víkingi. Á Toftum vann B68 stórsigur, 5-1, móti NSÍ, og í Miðvági vann HB 4-1 móti MB.

Seks frá United millum teir bestu

Hóast tað enn resta nøkur umfør, áðrenn enska Premier League er av, er ársins lið longu úttikið. Hesa ferð við seks spælarunum frá Manchester United millum teir 11 bestu. Í eini offensivari 4-3-3 er liðið sett, og hóast tað neyvan verður veruleiki, so er eingin ivi um, at nógvir venjarar fegnir vildu kunnu sett hetta liðið: Edwin Van der Sar - Glen Johnson, Rio Ferdinand, Nemanja Vidic, Patrice Evra - Ashley Young, Steven Gerrard, Ryan Giggs - Cristiano Ronaldo, Nicolas Anelka, Fernando Torres

Fakta um Vodafone-deildina

HB-Víkingur 2-1 (1-1)
1-0: Fróði Benjaminsen, 20.
1-1: Hans Jørgen Djurhuus, 30.
2-1: Milan Kuljic, 49.
Dómari: Lars Müller
HB: Símun Rógvi Hansen – Pætur Jørgensen, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Poul Thomas Dam – Fróði Benjaminsen (Tróndur Sigurðsson, 65.), Kári Nielsen, Milan Kuljic – Bjarni Jørgensen (Páll M. Joensen, 63.), Andrew av Fløtum (Johan Ejvind Restorff Mouritsen, 73.), Rógvi Poulsen
Gult kort: Fróði Benjaminsen, Kári Nielsen
Víkingur: Geza Turi – Sverri Jacobsen, Hjartvard Hansen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen (Símun Louis Jacobsen, 56.) – Andreas Lava Olsen, Sølvi Vatnhamar (Áslakur R. Petersen, 56.), Súni Olsen, Sam Jacobsen, Hans Jørgen Djurhuus – Finnur Justinussen (Magnus Skoralíð, 56.)
Gult kort: Niclas Niclasen

ÍF – B68 3-2 (1-1)
1-0: Høgni Zachariasen, 8.
1-1: Jóan Símun Edmundsson, 25.
2-1: Frank Poulsen, 51.
3-1: Andy Olsen, 54.
3-2: Ahmed Keita, 90.
Dómari: Eiler Rasmussen
ÍF: Andras Gango – Fritleif í Lambanum, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Jan Ellingsgaard – Dánjal á Lakjuni (Hilmar Petersen, 67.), Balázs Sinkó, Frank Poulsen, Andy Olsen – Nenad Saric – Høgni Zachariasen
Gult kort: Frileif í Lambanum, Poul Ennigarð, Frank Poulsen
B68: Vlada Filipovic – Dánjal Pauli Højgaard, Poul N. Poulsen, Pól Jóhannus Justinussen, Øssur Hansen – Jóan Símun Edmundsson, Ndende Adama Gueye, Jóhan Dávur Højgaard, Bogi Gregersen (Niklas Joensen, 69.) – André Olsen (Debes Danielsen, 53.) – Ahmed Keita
Gult kort: Ndenda Adama Gueye

07 Vestur – B36 4-2 (2-2)
1-0: Hans Arni Ellefsen 3.
1-1: Sam Malsom 34.
1-2: Johan Ellingsgaard 38.
2-2: Milan Pejcic 45.
3-2: Jens Erik Rasmussen 81.
4-2: Jens Erik Rasmussen br 90.
Dómari: Ransin Djurhuus
07 Vestur: Trygvi Askham – Ragnar Niclasen (Eli Nielsen, 26.), Gunnar Haraldsen, Torkil Kollsker, Sigtór Petersen – Hans Arni Ellefsen (Jóhan Petur á Stongum, 72.), Milan Pejcic, Rúni Nolsøe (Sjúrður Ellefsen, 36.), Tór-Ingar Akselsen, Hendrik Rubeksen – Jens Erik Rasmussen
Gult kort: Ragnar Niclasen, Gunnar Haraldsen, Sjúrður Ellefsen, Tór-Ingar Akselsen, Milan Pejcic
B36: Tróndur Vatnhamar – Magnus Olsen (Johan Ellingsgaard, 20.), Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Clementsen (Súni úr Hørg, 65.), Poul Arni Jacobsen – Høgni Eysturoy (Jákup á Borg, 75.), Klæmint Matras, Sam Malsom, Róaldur Jacobsen, Hanus Thorleifsson – Brima Koroma
Gult kort: Johan Ellingsgaard, Jákup á Borg

KÍ-AB 0-1 (0-0)
0-1: Rasmus Nielsen, 73.
Dómari: Dagfinn Olsen
KÍ: Jákup Mikkelsen - Steffan Kalsø, Rudolf Eliasen, Oddmar á Lakjuni, Jógvan Isaksen - Arnold Joensen (Bjarki Vágstún, 61.), Eli Simonsen (Álvur Christiansen, 70.), John Hammer, Erland B. Danielsen - Kristoffur Jakobsen, Tórður Lervig (Ovi Nysted, 79.)
KÍ: Odmar á Lakjuni, Álvur Christiansen
AB: Heðin Stenberg – Kenneth Jacobsen, Tehe Aristrede, Rói Danielsen, Janus M. Joensen - Dion Splidt (Thomas Hans Lamain Rubeksen, 58.), Liam Killa (Jónas Stenberg, 64.), John Hansen, Høgni M. Joensen, Nikolaj Eriksen (Tummas Justinussen, 90.) - Rasmus Nielsen, ,
Gult kort: Janus M. Joensen

EB/Streymur-NSÍ 3-4 (0-1)
0-1: Karoly Potemkin, 43.
1-1: Brian Olsen, 52.
1-2: Karoly Potemkin, 55.
2-2: Bárður Olsen, 71.
2-3: Einar Hansen, 81.
3-3: Sorin Anghel, 85.
3-4: Karoly Potemkin, 90.
Dómari: Páll Augustinussen
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Leif Niclasen, Marni Djurhuus, Egil á Bø (Pætur Dam Jacobsen, 76.), Alex José dos Santos – Hans Pauli Samuelsen (Dánjal Davidsen, 85.), Levi Hanssen, Brian Olsen (Gudmund Nielsen, 69.), Bárður Olsen, Sorin Anghel – Arnbjørn Hansen
Gult kort: Marni Djurhuus, Bárður Olsen, Sorin Anghel
NSÍ: Meinhardt Joensen – Jónhard Fredriksberg, Óli Hansen, Johan Troest Davdisen, Einar Hansen – Bogi Løkin, Jann Ingi Petersen (Jann Martin Mortensen, 88.), Høgni Madsen, Hjalgrím Elttør – Jústinus R. Hansen, Karoly Potemkin (Øssur Dalbúð, 90.)
Gult kort: Karoly Potemkin

vodafone deildin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 NSÍ	4	3	-	1	-	0	11	6	5	10
2 HB	4	3	-	0	-	1	7	4	3	9
3 B36	4	3	-	0	-	1	8	7	1	9
4 Víkingur	4	2	-	1	-	1	11	6	5	7
5 EB/S	4	2	-	0	-	2	8	6	2	6
6 AB	4	2	-	0	-	2	5	4	1	6
7 ÍF	4	1	-	0	-	3	4	8	-4	3
8 B68	4	1	-	0	-	3	4	9	-5	3
9 07 Vestur	4	1	-	0	-	3	8	14	-6	3
10 KÍ	4	0	-	2	-	2	3	5	-2	2

1. deild menn	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 B68	4	3	-	0	-	1	10	5	5	9
2 VB/S	4	3	-	0	-	1	11	7	4	9
3 FC Hoyvík	4	3	-	0	-	1	7	4	3	9
4 TB	4	3	-	0	-	1	9	7	2	9
5 HB	4	2	-	0	-	2	9	6	3	6
6 B71	4	2	-	0	-	2	8	6	2	6
7 NSÍ	4	2	-	0	-	2	8	12	-4	6
8 Víkingur	4	1	-	1	-	2	2	3	-1	4
9 MB	4	0	-	1	-	3	4	12	-8	1
10 Skála	4	0	-	0	-	4	3	9	-6	0

Máltindurin		
Vodafone-deildin		
Karoly Potemkin	NSÍ	6
Jens Erik Rasmussen	07 Vestur	3
Arnbjørn Hansen	EB/S	3
Milan Kuljic	HB	3
Hans Jørgen Djurhuus	Víkingur	3
Milan Pejcic	07 Vestur	2
Rasmus Nielsen	AB	2
Jákup á Borg	B36	2
Sam Malson	B36	2
Keita	B68	2
Rógvi Poulsen	HB	2
Hjalgrím Elttør	NSÍ	2
Óli Hansen	NSÍ	2
Andreas Lava Olsen	Víkingur	2
Finnur Justinussen	Víkingur	2
Súni Olsen	Víkingur	2

Besti málskjúttin í Vodafone-deildini fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti

Sagt í 3. hálvleiki

Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, sum Rás2 borðreðir afturvið Vodafone-deildini, eru SMS-viðmerkingar frá lurtarunum. Niðanfyri prenta vit nakrar av teimum mongu viðmerkingunum, sum vórðu sendar inn á 559999 sunnudagin. Tað ovast nevnda vórðu hesa ferð kosin at vera tey bestu, og fáa skrivararnir eitt útvarpstól frá Vøruhúsinum á Hjalla sendandi fyrsta dagin.

»Um tù ein dag hyggur at NSì og ikki veist hvønn tù uppa kanst stòla, huxa um "Ein dyst a gangin" ta id tù tosar vid òla:-D «

»Tad tykist sum um tad bara er ein kapping um hvør hevur yngst lid ì àr. B36, Kì og AB tosa bara um at lidid er so ungt, so ungt. ì mìnari verd eru øll ty lidini òynskt!«

» Til Hattar smsii fra einum mannii ur sorvagii sum segdii at hann var 07 fjepparii, havii eg tad at siga at hann kanska hevdii verii gladarii um arinii ajens erikki voru eitt sindrii lagriii. Men to hann er nokk gladarii enn eg eriii:(«

»NSI var so nogv best i dag. POTensen hevur nokk tikid viagra:)«

»Eg havi tad so ringt eg ma sita i bilinum og lurt eftur 3 halvleiki ti eg havi einki radio medan konan ger mat ruddar vaskar og støvsugar hehehe «

»Red Dragons er nyggja, stolta fjepparafelagid hjà ìF. Felagid umfatar higartil 7 reydar blusur og eina megafon. Man kann søkja um limaskap à facebook.«

»Super av AB-vidhaldsfolki i dag! Argjafrensarnir voru væl mannadir har norduri, og tad gav urslit! Leikararnir siga 1000 takk fyri!«

»Vit burdu fingid bara annan og tridja halvleik.. IF nyttar ongantid nakad fyrra «

» Nú mugu sundalagsfólk á apntekið eftir salvu fyri vespustikk.
Guliganz rulaðu totalt.
FORZA NSÍ «

»Eitt veit iiii og tad veit iiii B36 taptiii i Sørvàgiiii tvey màl av Jens Erikiii Og hann er yvir 40tii «

»Og hvør segdi at frensar stinka? AB ruuular, tillukku AB. Heilsan AB fan :-) «

»Stuttligt at hoyra jens erik aftur. Hann byrjar altìd svari vid: neii eg veitisjiii... «

»4-2 Sigurin til 07v var stòrt uppibordin. White tigers fjepparar vinkadu eisini vi tì stòra hvita flagginum adrenn dysturin byrjadi.;-) goo 07vestur!:- «

»Ótruliga smart av John Petersen at seta unga Tummas Justinussen inn i klaksvik at gera arbeidi lidugt. Hopi at Brian Kerr var til stadar i Klaksvik i dag. Ungi argjamadurin hevdi uttan iva verid ein ordans fongur hja landslidinum.
Heilsan ein Tummas Justinussen fjeppari. «

»B68 burdi kanska skift navn til B8 so ùssaligir vòru teir à vøllinum ì dag.:-P «